# Fyrstu 25 føroysku minuttirnir

**Trý hava fingið fulla úrtøku, og tey bæði føroysku feløgini hava einki fingið burturúr tveimum teimum fyrstu umførunum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð í nýggja kappingarárinum, sum nú er tvey umfør gamalt, var føroyskt íslett sunnudagin í superliguni. Johan B. Hansen í Horsens varð settur á vøllin í Parkini, tá ið tað restaðu 25 minuttir av uppgerðini hjá uppflytarunum ímóti FCK. Hann loysti ein av miðvallarunum av.

FCK var sjálvandi stórfavorittur, og heimaliðið vann 2-0. Fyrra málið skoraðu teir upp á brotsspark í 1. hálvleiki, og seinna málið skoraði Álvaro Santos, sum bara var á vøllinum síðsta hálva tíman. Hann loysti nýggja FCK mannin Peter Iljeh av.

Hóast teir spæla við spildurnýggjum liði, so hava teir í FCK fingið fult burturúr teimum báðum fyrstu umførunum. Horsens hevur einki stig fingið.

Saman við FCK hava Viborg og Brøndby fingið fulla úrtøku. Saman við Horsens hava AGF og AaB, sum Súni Olsen hevur sáttmála við, higartil einki fingið burturúr.

Viborg hevði vitjan av FCN. Gestirnir vístu væl meiri sannførandi avrik. Men í fótbólti eru tað málini, sum telja. Hagtølini boða frá, at Viborg, sum fekk fulla úrtøku burturúr teimum trimum møguleikunum, sum teir høvdu, vann 3-1.

Brøndby hevði leygardagin vitjan av Silkeborg. Meistararnir eru ógvuliga stinnir á heimavølli. Hetta var sjeynda ferðin á rað, at teir vunnu á heimavølli, uttan at mótstøðuliðið megnaði at fáa mál. Úrtøkan burturúr hesum sjey dystunum hevur verið 21 stig, og málmunurin 25-0!

Aab tapti í fyrsta umfarinum á heimavølli ímóti FCK. Hesa ferð vóru teir í Odense, og í 1. hálvleiki sá tað ljóst út hjá AaB, sum leikliga var omaná og á odda 1-0 í steðginum. Eftir hvíldina vendi alt øðrvísi, og OB vann 2-1.

AGF var í Harderslev og spældi ímóti uppflytarunum úr SønderjyskE, sum í fyrsta umfarinum høvdu megnað 1-1 í Farum. AGF legði seg framum, men SønderjyskE skoraði tvey mál og vann 2-1. Tað er púra óvæntað, at uppflytararnir nú eru á fjórða plássi.

Triðja umfarið verður á skránni í vikuskiftinum. Leygardagin fær Esbjerg vitjan av Brøndby, og sunnudagin sær skráin soleiðis út: Silkeborg-SønderjyskE, AGF-Viborg, Horsens-OB, AaB-FCM og FCN-FCK.



*Johan Byrial Hansen fekk fimm og tjúgu minuttir á liðnum hjá Horsens um vikuskiftið*

## Startrøðin til FM-róðurin á Ólavsøku 28. juli 2005

**Hósdagin, 28. juli, Ólavsøkuaftan, fara 56 bátsmanningar at rógva sjeynda FM-róðurin í ár. Harumframt vera eisini 16 barnamanningar við. Startrøðin verður henda:**

**Fimmmannafør, dreingir**

1 Tekla
2 Tjaldrið
3 Blikur
4 Ritan
5 Fípan Fagra VVS
6 Sílið
7 Drekin
8 Dúgvan 1G

**Seksmannafør, kvinnur**

1 Sølmundur 1G
2 Páll Fangi 1G
3 Riddarin
4 Jarnbardur VVS 1G
5 Lómur
6 Víkingur

**Fimmmannafør, gentur**

1 Erla Kongsdóttir 2G
2 Drekin 1G
3 Tekla
4 Blikur VVS
5 Tjaldrið 1G
6 Havfrúgvin 1G

**Fimmmannafør, kvinnur**

1 Falkur
2 Junkarin
3 Firvaldur
4 Royndin Fríða
5 Fípan Fagra
6 Sílið VVS
7 Frúgvin 1G
8 Blikur
9 Ørnin 1G
10 Ritan
11 Drekin 2G

**Seksmannafør, menn**

1 Kollfirðingur
2 Páll Fangi 1G
3 Víkingur
4 Hósvíkingur 1G
5 Sundabáturin
6 Jarnbardur 1G
7 Strálan VVS
8 Gongurólvur 1G
9 Sølmundur 2G
10 Lómur
11 Smyril
12 Stjørnan
13 Fuglfirðingur 1G

**Áttamannafør**

1 Miðvingur 1G
2 Argjabáturin 1G
3 Kvívíkingur 1G
4 Nevið Reyða VVS
5 Ørvur 1G
6 Árnfirðingur
7 Knørrur

**Tíggjumannafør**

1 Skálabáturin
2 Vágbingur
3 Havnarbáturin
4 Eysturoyingur VVS
5 Nólsoyingur 1G
6 Hoyvíkingur

**Barnaróður, dreingir**

1 Ritan
2 Sílið
3 Royndin Fríða
4 Havfrúgvin VVS
5 Fípan Fagra
6 Dúgvan

**Barnaróður, gentur**

1 Falkur
2 Hvassi
3 Ørnin
4 Tekla
5 Drekin
6 Firvaldur VVS
7 Dúgvan
8 Royndin Fríða
9 Sílið
10 Ritan

## Raðfylgjan til Ólavsøkuróðurin 2005

**Byrja verður kl. 13.30 við barnaróðrum**

1. Barnaróður 5- mf. dreingir 500 m

2. Barnaróður 5- mf. gentir 500 m

3. Gomul 6- mf.

4. 5-mf. oldgirls

5. 10-mf. oldboys

**FM- róður kl. 15.00**

6. 5-mf. dreingir

7. 6-mf. kvinnur

8. 8-mf. oldboys

9. 5-mf. gentir

10. 6-mf. menn

11. 8-mf.

12. 5-mf. kvinnur

13. 10-mf.